# rðradali



*Tey er von við størri skúla enn henda, men høvdu einki ímóti at flyta skúla sum so. Bert spell at tey ikki sleppa at rannsaka vøkru og stoltu náttúruna í Norðradali til fulnar*

**Myndir: Álvur Haraldsen**

haraftrat undir munandi øðrvísi umstøðum enn í Kollafirði.

Skúlin liggur niðri í bygdini, og rundan um skúlan er bøur. Og sum støðan var fyrrapartin í gjár, so var talan enn um óslignan bø.

Tí brúkti lærari teirra nógva tíð at greiða teimum frá, at tey máttu ikki fara út í bøin, men máttu halda seg inni á økinum frammanfyri skúlan.

Hóast fríkorter fyrst stóð á tímatalvuni kl. 10:30 í gjár, so sluppu næmingarnir kortini út nakað fyrri enn tað, til heiðurs fyri myndamann okkara.

Sum heild kann sigast, at tann fyrsta løtan í nýggja skúlanum sá út til at eydnast væl.

Men sum ein av lærarunum segði: - Hetta er ein neyðloysn fyri okkum. Men vit fara nokk at finna útav tí.

### Góð útgerð

Hóast mong ár eru liðin síðani skúlagongd var seinast í Norðradali, so eru skúlin kortini í sera góðum standi. Hann hevur m.a. verið nýttur til gudstænastur.

Í skúlannum eru tríggjar stovur, har pláss er fyri teim 39 næmingunum. Í tí einu stovuni vóru nóg mikið av skúlaborðum og stólum, men neyðugt var at flyta nakað av hesi útgerðini til skúlan aðrastaðnis frá til hinar stovurnar.

Í stovuni hjá 6. flokki stendur eitt fínt hvítt klaver, har eru teldur settar upp, men netsamband er kortini einki.

Sigast kann tí at útgerðin í skúlanum er nøktandi. Nú skulu so bara næmingar og lærarar venja seg við tær, fram til dagin, tá teirra egni skúli verður liðugur um stutta tíð.



*Tey í 5. flokki eru fá í tali – so tey fingu eina lítla skúlastovu. Her trívast tey eisini væl*

enn tann, tey eru von við í Kollfjarðar skúla.

Har er alt asfalt, men her býður stolta og vakra náttúran teimum nógvar aðrar møguleikar enn í heimbygdini.

Men tíverri, - tey sleppa ikki at gera brúk av hesum møguleikum, sum náttúran annars kundi veitt teimum.

- Um eg slapp út í bøin, so hevði eg beinanvegin farið at leita eftir kanin-ungum!, sigur ein genta.

- Kanin-ungar? Eru teir her?

- Ja, tað eru fleiri. Eg kenni eina gentu, sum segði mær frá tí. Men nú sleppa vit ikki í bøin.

- Tað er øgiliga keðiligt, haldi eg, sigur henda gentan.

### Í bø og haga

Dreingirnir vita ikki heilt, hvat teir skulu gera hetta fyrsta fríkorterið í nýggja skúlanum.

So teir gera bara tað sama sum genturnar, og fara so líðandi uppí at hoppa band í lítla skúlagarðinum. Men teir hava kortini aðrar ætlanir – um loyvi gevst!

- Tað hevði verið ótrúliga stuttligt at sloppið ein gongutúr niðan í fjøllini. Tey eru so pen og so høg, sigur ein teirra.

- Jamen, tað sleppa vit ikki, sigur ein annar. - Tað segði jú lærarin.

Hesin drongurin steðgar á eina løtu, og hyggur nú oman móti ánni.

- Ja, eg veit! Men ístaðin fyri .... Eg kundi eisini øgiliga væl hugsað mær at sloppið oman í ánna at fanga síl.

- Eg rokni við, at tað eru í túsundatali av sílum í ánni her. Men eg vænti ikki, at vit sleppa tað heldur, sigur hann. – Rotið!

## Undirvísing í Hoydølum steðgar 1. oktober

**Lærarar í Studentaskúlanum í Hoydølum steðga undirvísing í yvirmannaðu flokkunum í Hoydølum 1. oktober, tá sáttmálaskeiðið hjá lærarunum er úti. Hesum hevur Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara boðað Mentamálaráðnum frá, eftir at ráðið hevur góðkent tveir flokkar við 26 næmingum**

UNDIRVÍSING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í brævinum til Mentamálaráðið sigur Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara seg hava staðfest:

– at Mentamálaráðið hevur góðkent, at tveir av teimum nýggju flokkunum í Hoydølum eru yvirmannaðir, tí hóast flokkarnir eftir galdandi protokollat við Yrkisfelagið skulu hava í mesta lagi 24 næmingar, hava tveir av hesum flokkum 26 næmingar.

– at Mentamálaráðið tískil misbrúkar maksimumsregluna um 24 næmingar í hvørjum flokki, soleiðis at hon í staðin verður brúkt sum ein minimumsregla - t.e. minst 24 næmingar í hvørjum flokki.

– Fyri Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara er ikki ivi um, at talan í fyrsta lagi er um eitt tilvitað og illoyalt stig frá sáttmálamótpartinum, sum er ímóti bæði anda og teksti í galdandi protokollati. Í øðrum lagi er hetta ein stór vanvirðing av bæði næmingum og lærarum, og haraftrat stríðir tað ímóti øllum námsfrøðiligum meginreglum, har miðað verður ímóti at náa einstaka næmingin. Við 24 næmingum er hetta truplult, men við 26 gerst tað ómøguligt, sigur felagið.

Yrkisfelagið hevur tó valt ikki at steðga undirvísingini í teimum yvirmannaðu flokkunum í verandi sáttmálaskeiði.

– Hinvegin fer Yrkisfelagið at boða Mentamálaráðnum og leiðslu skúlans frá, at tá verandi sáttmáli fer úr gildi 1. oktober í ár, steðgar øll undirvísing í teimum yvirmannaðu flokkunum, hava myndugleikarnir til ta tíð ikki syrgt fyri at loysa trupulleikan, sigur felagið, sum ikki undir nøkrum umstøðum góðtekur framferðarháttin hjá Mentamálaráðnum og tey stig, ið Mentamálaráðið hevur tikið í sambandi við protokollat um 24 næmingar fara ikki aftur við borðinum við tær tilstundandi sáttmálasamráðingarnar.

